**Samstarv við POLITIKEN**
Sosialurin samstarvar við Politiken um at brúka greinar og myndir úr danska blaðnum. Hetta samstarv er eitt gott høvi at vísa á altjóða rák og kjak, og dagsins grein er ein liður í hesum.

# Heilaflýggjan gevur nýggja vitan

**Somaliland í Afrika hevur upplivað tað illa gitnu heilaflýggjanina. Men nú er landið í ferð við venda tað til vinning, við at útisetar koma heim við frískum hugsanum til gangs og menning fyri heimlandið**

*Peter Krogh Andersen*
*Jakob Sorgenfri Kjær*
*Hareisa Somaliland*
*Politiken*
*Illustratión: Ted Barker*

Á sølutorgunum í høvuðstaðnum í Somalilandi tosa fólk enskt, danskt og onnur evropeisk mál umframt somaliska móðurmáli. Landið er fult av fólki, sum hava lívsroyndir úr Norðurevropa, Miðeystri og Norðuramerika, og tað kemur meira enn so fyri, at tú kanst tosa við ein lokalan á donskum, svenskum ella norskum,

Útisetar eru komnir aftur til Somaliland - sum er eitt sjálvstýrandi øki í norðara parti av Somalia - at ferðast ella seta búgv, og við í viðførinum hava tey góðar útbúgvingar og arbeiðsroyndir. Vitan, sum hevur avgerandi týdning fyri lítla afrikanska statin.

Og tað er ikki bara Somaliland, sum hevur gleði av at fólk flyta heimaftur, hetta hendir í øllum menningarlondum. Nauja Kleist, granskari í migratión (flyting) við DIIS – Dansk Institut for International Studier, sigur tað soleiðis.

- Fyrr tosaði mann bara um »brain drain«, heilaflýggjan frá menningarlondunum. Hetta er framvegis en veruleiki, men í dag ber eisini til at tosa um »brain gain«, ein heilavinning. Fólki brenna ikki brýr, tá ið tey flyta uttanlands, men senda bæði pengar og nýggj hugskot heimaftur, sigur Nauja Kleist.

### Útlendska elitan

Streymurin av vitan ferðast ígjøgnum telefon og internet, tá ið útisetar halda sambandið við líka við vinir og familju, og táið tey so venda aftur, økist mongdin av nýggjum hugskotum og mannagongdum.

Hetta bæði sæst og merkist í Somalilandi. Privatskúlar verða bygdir fyri kapital og hugsanir uttanifrá, heimafturfluttir útisetar eiga meginpartin av nýbygdu húsunum í høvðusstaðnum Hargeisa, og í parlamentinum er ein fjórðapartur av tinglimunum fyrrverandi útisetar.

Sum heild eru somalisku útisetarnir ein týdningarmikil liður í uppbyggingini av landinum. Hetta leggur landsins ráðleggingarráðharri eisini herslu á. Hann er sjálvur komin heim eftir fleiri ár uttanlands, sum millum annað stjóri fyri Altjóða Arbeiðarastovninum hjá ST.

- Útisetar hava ótrúliga stóran týdning fyri landsins menning , tí tey geva okkum bæði pengar og vitan, sigur hann.

Tey seinastu 20 árini hevur Somalia annars mist bæði blóð og vitan. Langt borgarakríggj førdi við sær, at 80 prosent av fólkinum við útbúgving flýddu úr eysturafrikanska landinum.

Fólk flýggja framvegis frá krígnum í sunnara parti av Somalia, men í Somalilandi hevur verið friður síðani 1997, og flóttar og útisetar eru í ferð við at venda aftur. Kortini lýður landið framvegis av vitanartroti. Og fyri at fáa kvalifiseraðu fólkini at venda heimaftur, eru málrættað tiltøk sett í verk.

Menningarstovnurin hjá ST, UNDP, stendur fyri einum av hesum tiltøkum, har landsins universitet og ráð kunnu venda sær til UNDP við starvslýsingum, og síðan finnur ST stovnurin rætta profilin millum somaliarar í vesturheiminum, og starvsfólkið fær síðani løn frá ST fyri at búgva og arbeiða í Somalilandi í upp til eitt ár. Endamálið er, at útisetarnir koma heim og upplæra tey lokalu.

- Útisetin skal ikki bara gera sítt arbeiðið, men geva sína vitan og kunnleika víðari til tey, sum hann arbeiðir saman við. Tá ið hann so fer aftur til sítt vesturlendska lív, liggur ein partur av hansara vitan eftir í landinum, sigur Ali Ibrahim, projektleiðari fyri UNDP í Hargeisa.

Men fyri at fáa enn størri menniskjaligan kapital aftur til landið, má staturin eisini gera sítt. Grundleggjandi liviumstøður mugu betrast, leggur projektleiðarin í UNDP herslu á.

- Ein persónur í Danmark er vanur við ljós, wc og marglæti. Heimafturkomin má hann liva uttan ravmagn og vatn, so sjálvandi leingist hann aftur til Danmarkar. Tí má infrakervið vera í lagi, sigur Ali Ibrahim.

Ráðharrin í Ráðlegging, Ali Abbayare vil fegin gera íløgur í betri liviumstøður fyri tey, sum flyta aftur, men hann hevur ikki pengarnar.

Landið við sínum 3,5 milliónum íbúgvum hevur eina fíggjarlóg á 150 milliónir krónur. Samstundis stúrir ráðharrin fyri, at somaliskir útisetar missa tøttu bondini til heimlandið. Tá ið tað hendur, steðgar innflutningurin av vitan og kapitali, metir hann.

- Annað ættarlið fer at tilpassa seg vertslandið, og tey fara fyrst og fremst at hugsa um seg sjálvi.

*Jakob.sorgenfri@pol.dk*
*Umsett: Dorit Hansen*



Tíðargreinin

## … Aftur um løgtingsvalið

flokkarnir sleppa leysir frá lokaltankagongdini og heldur fáa atkvøður úr landinum sum heild.

### Tillaging neyðug

Tað verður neyðugt hjá flokkunum at læra seg hvussu teir skulu vera samanhangandi landsflokkar. Valið hesaferð bar brá av, at summir flokkar dugdu væl at spjaða síni valevni kring um í landinum, meðan aðrir flokkar hava latið standa til og hava harvið miðsavnað sín tingbólk í høvuðstaðnum.

Men tað geografiska fer framhaldandi at hava týðning millum veljarar nógv ár framyvir. Arvurin eftir valdømunum verður ikki so skjótur at broyta sum vallógin.

Flokkarnir verða noyddir at hugsa miðvíst um ikki einans at appellera til nøkur hugsjónarlig segment, men eisini til nøkur geografisk segment. Góðar og aktuellar meiningar kunnu vera mikið góðar, men tað vil ikki altíð vera nóg mikið. Tí noyðast flokkarnir støðugt at analysera hvar tað er neyðugt at styrkja flokkin. Hvar mugu lokalfeløgini styrkjast? Hvussu verður funnið fram til lokal valevni, ið kunnu røkka eitt sindur breiðari? Hvussu breitt skulu valevnini appellera fyri ikki at taka frá øðrum í flokkinum? Og hvussu stórt geografiskt yvirlapp kunnu valevnini loyva sær at hava, áðrenn tey byrja at eta ov nógv av hvørjum øðrum?